gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Ørkymla veljaran!

Føroyski veljarin er meiri ørkymlaður en nakrantíð í málinum um framtíðarstøðu Føroya, eftir orðaskiftini í Fólkatinginum og Fimmaranum mikudagin. Eru mótsetningar í donsku stjórnarfráboðanum í sambandi við yvirtøkuætlanina, heimastýrisskipanina og heildarveitingina, eru sanniliga eisini mótstríðandi viðurskifti í framløgunum hjá løgmanni og varaløgmanni.

Samstundis sum varaløgmaður heldur fast um, at samtyktin um "Sjálvstýri Føroya fólks" merkir fullveldi í seinasta enda, pakkar løgmaður spurningin inn. Hann heldur fram at tosa um komandi samráðingar, eina breiða semju, eins og hann illneitast, tí forsætisráðharrin boðar frá samráðingarúrslitinum, áðrenn samráðingarnar eru byrjaðar. Hann melur rundan um fullveldisspuringin, sum samtyktin um "Sjálvstýri Føroya fólks" jú endar við!

Her er júst ein munur millum danskar og føroyskar politikkarar. Danska stjórnin hevur tikið eina støðu út frá lóggávuni á hesum øki, hvat hon sjálv heldur, og hvat flokkarnir á Fólkatingi halda. Allir flokkar – uttan teir víðgongdu á høgraveingi – eru samdir um, at ein virðilig loysn skal finnast í málinum, men teir halda fast um, at vilja føroyingar hava fullveldi, so verður heildarveitingin lækkað niður í einki eftir fýra ella fimm árum.

Um landsstýrið veruliga roknaði við, at danska stjórnin fór at broyta áskoðan um tey fýra-fimm árini, eftir at landsstýrið einaferð afturat hevði tillagað fullveldisætlanina til at "niðurlaða blokkin" og "tøma heimastýrislógina", so leingi sum endamálið er fullveldi, er bláoygni út um tað mark, sum ikki kann góðtakast fyri ein politikara.

- Søgan endurtekur seg, sigur varaløgmaður. Tað er møguligt, at danska stjórnin tillagar okkurt eftir, hvussu støðan hjá føroyingum broytist, og at okkurt ósamsvar er, men heildarfatanin er tann sama: vilja føroyingar úr ríkisfelagsskapinum, verður skiftistíðin fýra ár! Tí er søgan tann sama og veruleikin tann sami. Men henda veruleika – við teimum búskaparligu avleiðingunum – fer landsstýrið ikki at leggja fyri veljaran, tí henda veruleika vrakar veljarin allarhelst. Tað hava veljarakanningar víst, samstundis sum tær hava víst, at meirilutin í Føroya fólk vil hava eina millumloysn! Eftir stendur at landsstýrið skyldar veljaranum eitt svar uppá, hvussu tað ætlar at fáa endarnar at røkka saman bæði tá tað snýr seg um samtyktina um "Sjálvstýri Føroya fólks" og greiðu útmelding stjórnarinnar um fýra ára skiftistíð. Kanska tað var passandi fyri løgmann og fyri allar partar at skriva út val nú!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Suðuroyingar eiga at virka fyri tunli um Skopunarfjørð

**Jón Rasmussen**

Tað gagnar bæði sandoyingum og suðuroyingum, og eftir fáum árum er tað bíligari enn at byggja eitt nýtt suðuroyarskip

Fyri suðuroyingar er vandin við at fáa ein fínan, stóran nýggjan Smyril, at títtleikin verður læstur fastur, ella minkar, og at møguleikarnir fyri at knýta Suðuroynna tættari at restina av Føroyum trúliga verða útsettir 20-30 ár.

Tað er ógvuliga sannlíkt at undirsjóvartunnil til Sandoynna, saman við ferjusambandi imillum Sand og Hvalba, kostar tað sama sum ætlanin at byggja nýggjan Smyril og rakstrurin av honum í einum 20-ára skeiði.

Nýggi Smyril gevur samband 8 til 12 ferðir um vikuna og eina ferðatíð upp á 1 tíma og 45 minuttir.

Ein undirsjóvartunnil og hóskandi ferja ímillum Hvalba og Sand, gevur samband 3 til 4 ferðir dagliga og eina ferðatíð upp á knapt 2 tímar fyri rutuferðandi og gott hálvanannan tíma fyri koyrandi í privatbili.

Út frá hesum fyribilsmetingum vil eg mæla til, at undirsjóvartunnil um Skopunarfjørð og ferja ímillum Sand og Hvalba, verður kannað.

**Hevði fáar møguleikar**
Landsstýrið hevur bert havt fáar møguleikar at velja millum - tað hevur verið tosað um luksuskatamataran og hinvegin hevur verið tosa um ferjusamband um Sandoynna.

Ein katamaranferja er sera kostnaðarmikil og tí er hesin møguleikin tíðliga sáldaður frá.

Ferjusamband um Sandoynna krevur minni íløgur enn beinleiðis samband. Títtleikin kann verða væl hægri - nátúrliga 21 ferðir um vikuna í mun til 12-13 ferðir, sum nú er. Rakstrarkostnaðurin vil verða lægri, men tá ið inntøkurnar, orsakað av bíligari ferðaseðlum, eisini verða lægri, verður rakstrarúrslitið nærum tað sama. Samlaða ferðatíðin er nakað hægri, men orsakað av tí økta títtleikanum, hevur hetta ongan týdning.

Hinvegin hevur tað stóran týdning, at fyri ferðandi ímillum Tórshavn og Suðuroynna, vil sambandið um Skopunarfjørð verða ein fløskuhálsur, sum fleiri ferðir um vikuna vil ávirka, at ferðandi úr Suðuroynni muga bíða gott tíma á Sandoynni og at fleiri ferðandi úr Tórshavn muga fara heiman meira enn tíma, áðrenn annars var neyðugt.

Natúrligt var tí fyri landsstýrið at velja at byggja nýggjan Smyril.

Sjálvur haldi eg, at nýggi Smyril er valdur ríkiliga stórur, tí eg vænti ikki, at tað verður vilja til at lata skipið sigla tær minst 14 ferðir um vikuna, sum er neyðugt, um rutusambandið skal virka mennandi fyri Suðuroynna.

**Heilt týðiligt**
Higartil hevur hugsanin um undirsjóvartunnil til Sandoynna og sigling til Suðuroynna, ikki verið samantvinnað.

Við at seta eina ferju, sum er eitt sindur størri enn enn Dúgvan, men eisini nakað minni enn Smyril, í sigling millum Hvalba og Sand, verður siglingartíðin ímillum ein tíma og hálvantíma. Persónbilar vilja koyra av Sandi til Tórshavn upp á umleið 30 minuttir, bussar og rutubilar vilja koyra teinin upp á umleið 45 minuttir.

Samanlagt fæst samband úr Suðuroynni til Tórshavn minst 21 ferðir um vikuna - 3-4 ferðir dagliga - samlaða rutuferðatíðin vil verða minni enn 2 tímar og ferðandi við egnum bili vilja verða frammi gott hálvanannan tíma eftir fráferð úr Suðuroynni.

Fyri mær er tað nú tí heilt týðuligt, at áðrenn nýtt suðuroyarskip verður bygt, eigur føroyska samfelagið at hugsa um kombinatiónina at byggja tunnil undir Skopunarfjørð og at skipa ferjusambandið til Suðuroynna úr Sandoynni.

Tað eigur at verða mett um samlaða kostnaðin av tunli undir Skopunarfjørð, ábótum á havnalagið á Sandi og í Hvalba, og um, hvat tað kostar at hækka tunnilin ímillum Hvalba og Tvøroyri og, hvussu stórar íløgurnar verða í hóskandi ferju at sigla ímillum Sand og Hvalba.

Mítt git er, at hesar íløgur eru umleið 700 milliónir krónur.

Hesar íløgur eiga at verða sammettar við íløgur í nýtt Suðuroyarskip, íløgur í ferjulegu í Suðuroynni, broytingar av ferjuskáa í Tórshavn og íløgur í eykaferju til Strandferðsluna - alt í alt einar 400 milliónir krónur.

Fyribils kann metast, at munur av rakstrarútreiðslunum verða umleið 30 milliónir árliga, men sjálvandi er neyðugt við meira neyvum rakstrarmetingum - metingar av rakstrarkostnaði av tunli, av sigling og av rutukoyring, og metingar av, hvussu rakstrarálítandi losynirnar verða.

Til síðst eiga at verða gjørdar nyttumetingar - cost-benefit-analysur.

Tað vil verða lutfalsliga lætt hjá landsstýrinum at fáa gjørt hesar metingar út frá verandi verkætlanum.

# Spennandi jazz-dansur

Enn eina ferð verður dansiskeið í høllini á Stórheyggi. Hesa ferð verður jazz dansur á skránni. Skeiðið verður leygardagin 12. mai kl. 13.00-16.00, og tað er Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen, ið undirvísir. Sóley hevur seinasta árið útbúgvið seg um dansara á skúlum í Danmark og hon vann stóru kappingina í Føroyum sum fimt vakurt sprund og hetta hevur givið henni møguleika at luttaka á altjóða stevnum í summar. Fyrst í Spaniu og síðan í Hong Kong.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Torbjørn og tøl

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður*



Tað er møtumikið at gera viðmerkingar til røður hjá Torbjørn Jacobsen, tí hann sum oftast droymir seg burtur í annan heim, millum hetjur og hugsjónarmenn, ið berjast ímóti afturhaldi og sviki.

Sum so var flaggdagsrøðan, ið hann helt í Sørvági í ár onki undantak. Og tó. Einastaðni í røðuni var hann ítøkiligur og røðaði um føroyska búskapin, ið sambært Torbjørn, var á markinum til at verða sjálvberandi. Hann segði m.a. ”Tað er ein sannroynd, at bara 8% av danska blokkstuðlinum komu inn í føroysku ringrásina, í árinum sum farið er.”

Nú veit eg ikki hvussu Torbjørn roknar prosentir, tá hann kann fáa uml. 50% at verða 8%. Nú eru vit í tí hepnu støðu at landskassaroknskapurin fyri 2000 longu er framlagdur og sambært roknskapinum var yvirskotið í 2000 475 mió, tá eisini avdrátturin uppá 127 mió av landskassans skuld til danska statskassan var goldin. Blokkstuðulin fyri 2000 var 973 mió og tá landskasssans yvirskot ”bert” var 475 mió, so merkir hetta at í øllum føri, at 498 mió av blokkstuðlinum vóru brúktar til at avhalda landskassans útreiðslur. Umroknað til % gevur hetta uml. 50% og ikki 8%. Hevur Tórbjørn rætt við sínum 8% so vóru bert 78 mió av blokkstuðlinum í 2000 nýttar til landskassans útreiðslur. Harumframt avhalda danir fyri smáar 300 mió í øðrum útreiðslum, til umsiting, løgreglu, krígspensiónir o.a., ið ikki er tikið við her.

Nú veit eg ikki um prosentini hjá Torbjørn eru tikin úr leysum lofti ella um hetta eru almenn tøl frá landsstýrinum. Haldi tó ikki at tey kunnu standa ósvaraði, tá tølini landskassaroknskapinum fyri 2000 eru til taks.

Eitt minstakrav til ein landsstýrismann má verða at hansara tøl eru eftirfarandi og at hann hevur nøkulunda skil á vanligari prosentrokning, annars mugu vit finna onkran ”gemenan bókhaldara” at veita honum eykaundirvísing.

# Aril Edvardsen í Føroyum á hvítusunnu

TÍÐINDASKRIV
*Harald Mydland*



*Norski heimsevangelisturin Aril Edvardsen er høvuðstalari á hvítusunnustevnuni í Havn á hvítusunnu*

Norski heimsevangelisturin Aril Edvardsen er høvuðstalari á hvítusunnustevnuni í Havn á hvítusunnu.

Í Noregi eru Troens Bevis og ungdómsfelagsskapurin Jesus Kollveltingin byrjaði eitt spennandi samstarv til gleði fyri báðar partar. Hetta kemur at seta sín dám á summarstevnuna í Sarons Dal í summar.

»Jesus Revolution« hevur venjingarlegu fyri ungdómsbólkar í Sarons Dal í Noregi í summar. Nakrir hundrað glaðir ungdómar inntaka dalin í summar og skulu venjast upp til bólkatúrar í Noregi og Evropa.

Hesi ungu saman við Stephan og Annu Christiansen, sum stovnaðu »Jesus Revolution«, koma at seta sín stóra dám á ungdómsfestivalin, »Jesus to the Nations«, sum verður 21.-24. juni, og á tað stóru skandinavisku summarstevnuna 14.-22. juli.

Fyrsti ungdómsbólkurin verður sendur avstað meðan Jesusfestivalurin er; hin bólkurin meðan summarstevnan er. Stephan Christiansen verður ein av høvuðstalarunum á báðum stevnunum, meðan væntað verður, at Anna fer at tala á kvinnumøtinum á summarstevnuni.

**Stórur ísraelsdagur og fleiri spennandi talarar**
Teir messiansku leiðararnir úr Ísrael, Lisa og David Loden, vitja eisini í ár summarstevnuna. Tey luttaka tann stóra Ísraelsdagin.

Onnur kend nøvn eru svensk/kanadiarin Peter Ljungren, sum var væl móttikin seinasta ár, og sum hevur havt stórar møtirøðir kring heimin seinastu tíðina, har fleiri hundrað túsund hava verið á møti. Fyrsta stevnusunnudagin fer Ljungren at tosa, og verður hetta møtið eitt serligt bønamøti fyri sjúkum.

Úr Kenya kemur fyrrverandi heksadoktarin Peter Karangu, saman við Richard Gunning úr Belfast. Peter Karangu hevur verið bíbliuskúlanæmingur í Sarons Dal. Hann og Richard Gunning hava sett á stovn 250 samkomur í Kenya.

Kendir norskir prædikumenn sum Halvard Hasseløy, Ludvig og Lisa Karlsen, Kjell Haltorp, Gunnar Jeppestøl, Arnfinn Clementsen og Sten Sørensen taka eisini lut á stevnuni.

**Aril Edvardsen til Føroya á hvítusunnu**
Aril Edvardsen hevur eitt strævið stevnusummar framman fyri sær. Umframt stevnurnar í Sarons Dal skal hann hava eina møtirøð í Reykjavík í mai. Á hvítusunnu verður hann á stórari møtirøð í Føroyum, meðan Svøríki, Finnland og Danmark fáa fleiri vitjanir summarmánaðirnar.

Eisini talar hann í Bíbliucamping í Gatten í Jyllandi 23. og 24. juni og á landsstevnuni hjá hvítusunnusamkomunum í Mariager 11. juli.

Ímillum uttanlandsferðirnar verður Aril Edvardsen millum høvuðstalararnar á fleiri norskum stevnum: Justøya Bíbliucamping, Dvergnestangen Bíbliucamping, Summarstevnuni hjá Ísraelsmissiónini í Grimstad, Landsmøtinum hjá Fríu vinunum á Karmoynni, og stevnuni hjá Evangeliisentrunum á Østerbo.

Í heyst verður aftur stevna í Noregi og stórar møtirøðir og predikantseminar í Rwanda og Pakistan, umframt at Aril er millum høvuðstalararnar á Altjóða stevnuni fyri kirkjuvøkstur í Korea, sum pastor David Yonggi Cho leiðir.

